# Eg vil ikki út



*Jørgen Niclasen viðgongur, at hann hevur kent seg kroystan seinastu tíðina*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Jørgen Niclasen fer ikki sjálvboðin úr starvinum sum landsstýrismaður við fiskivinnumálum**

MISÁLIT
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Jørgen Niclasen sigur seg onga grundgeving hava fingið fyri at reisa seg úr landsstýrissessinum. Juridiskt er einki gjørt skeivt, sigur hann. Men líkt er til, at onkur vil hava høvdið av mær.

Jørgen Niclasen viðgekk, tá hann kom aftur úr Íslandi fyrrapartin týsdagin, at hann hevði verið rímiliga kroystur hesar seinastu dagarnar. Og tað metti hann seg hava grund til, tí tað var líkt til, at ein politisk avgerð fór at gera, at hann noyddist frá sum landsstýrismaður.

– Men tá ið tað er staðfest, at eg ikki hava brotið nakra lóg, so havi eg onga juridiska grund til at fara. Er tað politiskt, at onnur vilja hava høvdið av mær, so mugu tey um tað, segði Jørgen Niclasen við Sosialin týsdagin.

– Eg havi avgjørt ongar ætlanir um sjálvboðin at fara úr starvinum, og eg havi avgjørt ikki sitið í flogfarinum og sungið: »Eg vil út«, segði hann.

Jørgen Niclasen hevur seinastu dagarnar verið í Íslandi í arbeiðsørindum, men hevur havt regluligt samband við løgman alla tíðina. Hann sigur seg tó ikki vita, hvat fer at henda við samgonguni, um Tjóðveldisflokkurin atkvøður fyri einum misálitsuppskoti.

– Andstøðuna skilji eg væl, at hon kemur við einum slíkum uppskoti. Teirra fremsta endamál er at blaka bumbur inn í samgonguna. Men fara samgongufólk at spæla við tær bumburnar, plaga tær ofta at bresta.

Jørgen Niclasen sigur seg ikki vita, hvussu tað verður, men heldur tað síggja út til, at Tjóðveldisflokkurin er á veg í leypin hjá andstøðuni.

– Eg dugi ikki at skilja, hvørjum farið verður eftir uttan mínum høvdi serverað á einum fati, sigur Jørgen Niclasen.

# Hetta man samgongan fara at tola

**Torbjørn Jacobsen, tingmaður Tjóðveldisflokksins, heldur ikki, at eitt misálit á Jørgen Niclasen eigur at slíta samgonguna. Um samgongan slitnar, væntar hann nýval**

MISÁLIT
*Edvard Joensen*



*Torbjørn Jacobsen væntar ikki, at samgongan slitnar av einum misáliti á Jørgen Niclasen*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Samgongan eigur ikki at slitna av hesum, heltTorbjørn Jacobsen, tingmaður Tjóðveldisflokksins, sum kom heim úr Danmark til tingfundin týsdagin, tá misálitisuppskotið móti Jørgeni Niclasen skuldi koma fyri.

Hóast Torbjørn Jacobsen metir handfaringina av málinum at hava verið ógvuliga skeiva frá leiðsluni í landsstýrinum, sum hann tók til, heldur hann ikki, at eitt mál sum hetta eigur at hava eina stjórnarkreppu við sær.

Torbjørn Jacobsen væntar ikki, at ein nýggja samgonga millum eitt nú Fólkaflokkin og andstøðuna er serliga sannlík.

– Aftan á at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin hava reist eitt misálit á ein landsstýrismann, sum løgmaður ikki heldur hevur gjørt nakað skeivt, er ógvuliga lítið sannlíkt, at teir tríggir flokkarnir fara at gera eina samgongu upp á tað, sum hendir av einum misáliti á Jørgen Niclasen.

– Tí er mest sannlíkt, um hendan samgongan ikki heldur fram, at løgmaður skrivar nýval út, sigur Torbjørn Jacobsen. Í fyrstu atløgu rokni eg við, at samgongan heldur fram kortini, og í øðrum lagi vænti eg nýval.



*Tað er at meta sum misálit á løgmann at krevja Jørgen Niclasen frá, sigur Kári P. Højgaard*

# Eisini misálit á løgmann

**Tingmaður Sjálvstýrisfloksins heldur, at eitt misálit á Jørgen Niclasen eisini er misálit á løgmann**

MISÁLIT
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Kári P. Højgaard, løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins, heldur, at atkvøður Tjóðveldisflokkurin fyri einum misáliti á Jørgen Niclasen, hevur hann samstundis atkvøtt fyri einum misáliti á løgmann. Soleiðis metir Kári Høgaaard politisku støðuna.

Hann dugir ikki at síggja annað enn, at løgmaður hevur sett málið so greitt upp, at har er einki at misskilja, sigur sjálvstýrismaðurin.

– Tann, sum atkvøður í móti Jørgeni Niclasen, hevur samstundis vrakað arbeiðið hjá løgmanni. Og tað tolir samgongan ikki, er Kári P. Højgaard, tingmaður Sjálvsstýrisfloksins sannførdur um.

Sjálvur ætlar hann at atkvøða blankt í tingsalinum, segði hann við Sosialin fyrrapartin týsdagin.



# Bill kann ikki samanberast við Jørgen





*Bill Justinussen hevur ikki gjørt nakað skeivt, sigur Heini O. Heinesen*

**Hóast ivi í løtuni verður sáddur um embætisførsluna hjá Bill Justinessen í sambandi við virksemi hjá Húsalánsgrunninum, sum landsstýrismaðurin hevur hartað grunnin fyri, so heldur formaðurin í Landsstýrismálanevndini hondina yvir Bill. Men hóast grunnurin ikki hevði heimild at selja ognir til Íbúðagrunnin, so kann hetta bøtast um, Løgtingið samtykkir eina eykajáttan upp á 11,5 milliónir**

EMBÆTISFØRSLA
*Theodor E. D. Olsen*

Í gjár klokkan 13.30 skuldi Løgtingið taka støðu til, um Jørgen Niclasen skuldi halda fram í sessinum sum landsstýrismaður, eftir at kanningarstjórin, Turið Debes Hentze, kom fram til, at umsitingin hjá Jørgeni Niclasen í Fiskimálaráðnum í tveimum førum hevur verið um kollsigla løgfrøðiliga sambært lógini um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan. Hetta kostaði landskassanum milliónir, tí mannagongdir vóru ikki fylgdar í sambandi við umleggingar av lánum.

Eftir áheitan frá Tórbjørn Jacobsen, tingmanni Tjóðveldisfloksins, vildi landsstýrismálanevndin hava tingformannin at seta ein kanningarstjóra at kanna embætisførsluna hjá Jørgeni Niclasen.

Heini O. Heinesen er formaður í Landsstýrismálanevndini, og hann duldi í Sosialinum í gjár ikki fyri, at hann helt, at Jørgen Niclasen hevði gjørt ymiskt, sum var álvarsamari enn tað, sum Turið Debes Hentze varð sett at kanna.

## Megnaði ikki at gjalda

Jørgen Niclasen er kortini ikki tann einasti ráðharrin í hesum døgum, sum er í andgletti.

Bill Justinussen, trivnaðarmálaráðharri, varðar av íbúðarmálum í landsstýrinum, og hansara umsiting kann eisini koma at kosta landskassanum nakrar milliónir. Húsalánsgrunnurin, sum Bill Justinussen hevur eftirlitisskyldu við, hevur nevniliga givið stýrinum fyri Húsalánsgrunnin bæði eina sonevnda minni hvassa og eina hvassari átalu fyri ávikavist at hava latið sjálvan Húsalánsgrunnin keypt fastar ognir uttan heimild, og fyri at hava selt somu ognir til Íbúðagrunnin. Trupulleikin við hesum var, at Íbúðagrunnurin ikki megnaði at gjalda. Landsstýrismaðurin við íbúðamálum eigur at hava eftirlit við stýrinum fyri Húsalánsgrunnin, men enn er ikki greitt, um hann ætlar at geva stýrinum aðrar sanktiónir enn átalur fyri sølurnar til Íbúðagrunnin.

## Gamalt mál

Síðani desember 2001 hevur Landsstýrismálanevndin kannað málið. Talan er nevniliga um eitt gamalt mál, sum er eldri, enn karrieran hjá Bill Justinussen sum landsstýrismaður. Fleiri aðrir landsstýrismenn hava nevniliga sitið í sessinum undan honum, men er ikki staðfest, um allir hava røkt eftirlitsskylduna nóg væl. Eitt nú skuldi nýtt stýri veljast fyri grunnin fyri fýra árum síðani, men hetta er ongantíð gjørt.

Av tí at Íbúðagrunnurin ikki hevur pening at gjalda tær ognirnar, sum Húsalánsgrunnurin hevur selt honum, noyðist landsstýrismaðurin nú helst at biðja løgtingið um eina eykajáttan upp á 11,5 milliónur krónur, og enn er óvist, hvat tingið fer at siga til tað.

Greitt er, at stýrið fyri Húsalánsgrunnin ikki er nøgt við átalurnar, sum tað hevur fingið frá Bill Justinussen.

Í einum skjali frá 18. desember í fjør, skrivar m.a.: »At landsstýrismálanevndin sum tingnevnd hevur átikið sær leiklutin sum de-facto dómstólur mótvegis landsstýrismonnunum, uttan at teir hava nakran reellan møguleika at verja seg ella bert at muta ímóti, er í sær sjálvum ein sera álvarsligur spurningur um samanblanding av lóggávuvaldi og dómsvaldi, sum er í andsøgn við høvuðsreglurnar um valdsbýtið í stýrisskipan okkara, og sum átti at verið tikin upp gjøgnum eina nærri tulking av § 39 í stýrisskipanarlógini.

At landsstýrismaðurin kennir seg kroystan at gera okkurt fyri at vera í samljóði við »dómin« hjá landsstýrismálanevndini er menniskjansligt; men tá tær »nasar«, sum hann hevur givið stýrinum fyri Húsalánsgrunnin o. a., byggja á skeivleikar, misskiljingar og tíverri eisini beinleiðis reingingar av sann-leikanum, hava vit einki annað val enn at tala at.«

Sostatt ber til at siga, at Bill Justinussen er komin í eina støðu sum landsstýrismaður, har hann hann kann verða noyddur til at koyra stýrið frá. Landsstýrismaðurin og stýrið eru jú ósamd, um keypini og sølurnar hjá grunnunum.

Ráðharrin hevur sum nevnt skyldu at hava eftirlit við Húsalánsgrunninum, men kann ikki ráða fyri, hvussu stýrið fyri grunnin skal arbeiða og umsita ognir.

Tí kann hugsast, at tá Løgtingið umhugsar misálit á fiskimálaráðharran, sum varð skuldsettur fyri at hava kostað landskassanum einar 11 milliónir, at onkur tingmaður sær ein parallell millum Jørgen Niclasen og Bill Justinussen, sum somuleiðis varðar av einum málsøki, ið helst fer at biðja tingið um eina eykajáttan, sum er á leið somu upphædd.

## Ikki kannast av kanningarstjóra

Nú er tað kortini sera sjáldsamt við uppskotum og samtyktum um misálit á landsstýrismenn í Føroyum, og Heini O. Heinesen formaður í Landsstýrismálanevndini, sum skal hava eftirlit við embætisførsluni hjá landsstýrismonnum, heldur ikki, at Bill Justinussen hevur gjørt nakað skeivt. Hann viðgongur, at ráðharrar kunnu koyrast frá av politiskum orsøkum, men hann heldur, at av tí at tann gamla Landsstýrismálanevndin gjørdi ov lítið, og at hetta málið stakk seg upp áðrenn Bill'sa tíð, so skal tað ikki fáa avleiðingar fyri hann, tí hetta málið kann ikki samanberast við tað hjá Jørgeni Niclasen. Spurdur, um hann væntar at ein kanningarstjóri fer at kanna arbeiðið hjá Bill Justinussen eins og tað hjá Jørgeni Niclasen, sigur Heini O. Heinesen, at tað væntar hann ikki, tí so kundu vit tað sama avtikið Landsstýrismálanevndina. Hann sigur seg ikki vita, um ein eykajáttan verður samtykt, men sjálvur er hann ímóti at avtaka Húsalánsgrunnin, sum møguliga kann verða ein avleiðing, um peningur ikki verður samtyktur til eykajáttan.